Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um vápn v.m.
(Reglur um útflutning av vápnum og um atgongd til vápnaskránna)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 43 frá 22. mai 1969 um vápn v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 12. mai 1980 og løgtingslóg nr. 81 frá 22. mai 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:
"Løgtingslóg um vápn o.a."

2. Í § 1, stk. 3 verður "evna til" broytt til: "flyta út".

3. Í § 2, stk. 1 verður "§ 1" broytt til: "§ 1, stk. 1".

4. Í § 3 a, stk. 1 verður aftan á "at flyta inn," sett: "flyta út,".

5. Í § 4, stk. 1 verður aftan á "reglur um" sett: "loyvi,".

6. Í § 4, stk. 1 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um beinleiðis atgongd til upplýsingarnar, sum eru skrásettar sambært 1. pkt."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Samtykt á Løgtingi hin 19. november 2020 við 28-0-0 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Konfererað við tað samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 19. november 2020

stjóri

lm. nr. 21/2020